

sansir.fo

# FULLTRÚI TIL LØGMANSSKRIVSTOVUNA

Vit søkja eftir fulltrúa til Menningardeildina á Løgmans–skrivstovuni at seta 1. februar 2007 ella skjótast til ber.

**Starvið**
Starvið fevnir í høvuðsheitum um at menna og samskipa samfelagsligar ætlanir, ið løgmaður hevur sett sær fyri at fremja. Serligur dentur verður lagdur á arbeiði, ið skal styrkja Føroyar í alheimsgerðini. Hetta arbeiði verður at gera í tøttum samstarvi við viðkomandi myndugleikar og sendistovur Føroya uttanlands.

Nakrar av týdningarmiklu uppgávunum hjá Menningardeildini eru at:

- Standa fyri og samskipa útflutningsframa
- Vera við til at altjóðagera Føroyar í breiðum týdningi
- Samskipa einskiljingarætlan Landsstýrisins
- Standa fyri og samskipa Visjón 2015
- Vera við til at røkja fíggjarviðurskifti Løgmansskrivstovunnar

**Faklig førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu vera fakliga kønir og hava viðkomandi samfelagsliga útbúgving frá hægri lærustovni. Harafturat skulu umsøkjarar vera stinnir í føroyskum og enskum máli. Tað er fyrimunur at hava royndir at standa fyri verkætlanum. Tað er somuleiðis fyrimunur at kenna til almenna fyrisiting og at hava holla vinnulívsvitan og/ella vinnulívsroyndir.

**Persónlig førleikakrøv**
Tað er fyrimunur, at umsøkjarar hava innlit í serføroysk sum altjóðalig viðurskifti á samfelagsliga og vinnuliga økinum. Umsøkjarar skulu eisini vera ágrýtnir av lyndi, miðvísir, tænastuhugaðir og duga væl at samstarva.

**Løn og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Løgmansskrivstovuna og stjórnarráðini.

**Gjølligari upplýsingar um starvið**
Umsøkjarar eru vælkomnir at seta seg í samband við Áka Johansen, deildarstjóra, tlf. 351053, fyri at frætta meira um starvið.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, lívrensli (CV) og viðmælum skulu sendast til:

Løgmansskrivstovan
Tinganes
100 Tórshavn

ella til teldupostadressuna: info@tinganes.fo

Umsóknir skulu vera Løgmansskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 11. desember 2006.

---

Løgmansskrivstovan stýðjar løgmanni í at stjórna landsstýrinum og hevur ábyrgdina av at fyrireika og fremja uppgávurnar, sum løgmaður hevur samsvarandi stýrisskipanini, nevniliga at samskipa og hava eftirlit við landsstýrinum, harumframt fyrisiting og uttanríkismál.

VIT DRAGA EINA LÍNU · VIT SETA SKYNSEMI Í HÁSÆTI · VIT VILJA VITA · VIT BRÓTA SLÓÐ

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

# Sethús í vági til sølu



Húsini eru í 3 hæddum við lofti, miðhædd og kjallara.
Á loftinum eru 3 kømur, teldurúm, stórt klædnaskáp og wc.
Í miðhæddini eru køkur, stova og baðirúm.
Í kjallaranum er vaskirúm.
Uttanfyri er hjallur og stór terrassa.

*Selt verður um hóskandi boð fæst.*

**Tlf 37 47 47 ella 58 42 60**

# MÁLARALÆRLINGAR

Uni Zachariasen, Djúpagilsvegur 44, FO-188 Hoyvík, tlf. 319299

Vit sóknast eftir tveimum fólkum, ið hava hug at útbúgva seg til bygningsmálara.

**Vit vænta:**
At tú ert arbeiðssom/samur, álítandi og hugagóð/ur til hetta arbeiði.

Skrivlig umsókn ynskist.

**Málarameistarin Uni Zachariasen**

*Vit eru eitt virki málarafirma og í løtuni arbeiða 12 fólk hjá okkum*

STARVSLÝSING

# Maskinlærlingur

Søkt verður eftir dugnaligum og álítandi maskinlærlingi til maskinmiðstøðina í Kollafirði at byrja 1. januar, 2007. Maskinmiðstøðin hevur um hendi viðlíkahald av entreprenørmaskinum hjá Landsverki og høvuðsgoymslu av eykalutum og amboðum, herundir innkeyp og viðlíkahald av hesum.

**Arbeiðsuppgávur**
Arbeiðið fevnir um viðlíkahald og umvæling av maskinum o.ø. hjá Landsverki.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir annars verða sambært lærlingasáttmálanum millum Føroya Handverkarafelag & Landsfelag Handverkanna og Føroya Arbeiðsgevarafelag & Føroya Handverksmeistarafelag. Lærutíðin er 4 ár og endar við eini sveinaroynd.

**Umsóknir**
Umsóknir skulu sendast til lv@lv.fo ella

Landsverk,
Postsmoga 78,
110 Tórshavn,

og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 8. desember, 2006.

Merk umsóknina „Umsókn maskinlærlingur“ og viðmerk í umsóknini, hvar tú hevur sæð starvslýsingina. Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Jóan Petur Patursson, rakstrarleiðara, á tlf. 540 950 ella Johan Hansen, smiðjumeistara, á tlf. 540 951.

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK
*byggir land*

*Landsverk er ein stovnur undir Vinnumálaráðnum, og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvallamál, herundir tyrlupallar.*



# Ársfundur hjá Føroya ProVita

verður í Mentanarhúsinum í Fuglafirði leygardagin 25. nov. 2006, kl. 13.00.

Skrá:

| | |
|---|---|
| Kl. 13.00 | Fyrilestur um fosturtøku og heimsfatan |
| Kl. 14.00 | Frágreiðing um virksemi hjá Føroya Pro Vita |
| Kl. 15.00 | Kaffi |
| Kl. 15.30 | Ársaðalfundur samb. reglugerð (ársfrágr., roknskapur, val av nevndarl. v.m.) |
| Kl. 16.30 | Endi |

*Øll eru hjartaliga vælkomin.*
Nýggir limir kunnu tekna seg á www.provita.fo

KREA.FO · TEL 47 60 80

føroya PROVITA

provita@provita.fo · www.provita.fo